


STARVSLÝSING

## Maskinlærlingur

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja eftir summarfrítíðina.

Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum. Neyðugt er at hava vanligt koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkanna og Føroya Arbeiðsgevarafelag & Føroya Handverksmeistarafelag. Lærutíðin er 4 ár og endar við eini sveinaroynd.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. juli, 2007. Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Johan Hansen, smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

# Hví blaka pening burtur?



til ½ l = 2 kr.
yvir ½ l = 4 kr.

## Veitst tú
..at nú ber til at keypa sodavatn, øl og aðrar leskidrykkir í einnýtsluíløtum?

## Hugsar tú
..at tómu íløtini fært tú onki fyri, og at tey eins væl kunnu blakast burtur?

## Vilt tú
..hava eitt reint umhvørvi og vera við til at verja tað?

## Letur tú
..íløtini innaftur, verjir tú umhvørvið og fær pening afturfyri!

**Meiri á www.imr.fo**

LÝSING 371222

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ